# Showmenn í Mentanarhúsinum

DANSUR

2. jólakvøld og nýggjársaftan fara Showmenn at spæla til almennan dans í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Seinasta mánaðin hevur ikki verið so nógv at hoyrt til Showmenn, men 2. jólakvøld og nýggjársaftan fara teir at spæla til almennan dans í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. 2. jólakvøld byrjar dansurin kl. 24.00, meðan dyrnar lata upp kl. 01.00 nýggjársaftan.

Teir fýra, sum manna bólkin, eru ikki hvør sum helst, tá ið tað kemur til tónleik. Kim Hansen spælir tangentar og syngur, Jens Marni Hansen spælir guitar og syngur, Jóhannes á Rógvu spælir bass og aftan fyri trummurnar er James Olsen. Og hann man óivað eisini fara at tríva í onkran sangin eisini. Tónleikurin, sum Showmenn spæla, er nýggjur og góður dansitónleikur, ætlaður øllum aldursbólkum.



*Kátir jólamenn í jólahýri í Grasagarði í Havn leygardagin*

*Mynd: Eirikur Lindenskov*

# Jólamenn við jólaskipi

JÓL

Leygardagin kl 15 legði jólaskipið við jólamonnunum at bryggju í Vágsbotni í Havn.

Tað er fastur siður, at jólamenninir koma til høvuðsstaðin á henda hátt. Eftir hugnaløtu við jólatónleiki niðri á bryggjuni í Vágsbotni løgdu jólamenninir leiðina niðan í býin, har teir góvu størri og smærri børnum karamellur og annað gott.

Sosialurin hittir hesar kátu jólamenninar í Grasagarði.

# Take Off á Vertshúsinum

SPÆLISTAÐ

*Tíðindaskriv*

Annað jólakvøld fer útisetaorkestrið Take Off at spæla til dans á Vertshúsinum í Havn.

Har siga tey annars,at tiltakið seinasta vikuskifti, har ikki færri enn 15 orkestur og solistar spældu varð sera væl eydnað, og var Vertshúsið fullsett av tónleikaáhugaðum fólki. Eisini siga tey, at tiltakið var eitt gjøgnumbrot fyri at fáa etablerað eitt spælistað í Tórshavn, og ætla tey at endurtaka tiltakið í februar mánaði.

Kim Simonsen

# Dreymar um opin vindeygu og onnur essey

ÚTGÁVA

*Tíðindabræv frá Mentanargrunni Studentafelagsins*

Høvundurin hevur seinnu árini gjørt dyggiliga vart við seg í føroyskum bløðum við beinraknum og atfinnijngarsamum greinum, har serliga tjóðskaparrørslan við Høgna Hoydal á odda hevur verið húðflongd. Hendan verður ákærd fyri at vilja laða upp undir sjálvdyrkan, fortíðina og tjóðskaparliga tokutalu. Fyri at droyma um ein tjóðskap, ið er gøddur úr einum lendi av fólkafundum og ørligum romantiskum bønarmøtum. Høvundurin vil eisini loysing, men á einum modernaðum ikki nationalistiskum støði, har ein livandi kjakmentan fær innivist.

Greinirnar snúgva seg kortini ikki bara um tjóðskaparstríðið, men eisini um leiklutin hjá tí intellektuella í Føroyum í dag, hvønn týdning listin hevur og hvussu føroyska málið verður viðfarið av filologunum. Hartil eru greinar um Regensen, um paranoia sum politiska mentan og hugleiðingar frá eini ferð til Tübingen í Suðurtýsklandi.

Kim Simonsen, sum er føddur í 1970 og uppvaksin á Strondum, er cand.phil í norðurlendskum bókmentum. Hann er í løtuni konferenslesandi á Københavns Universitet. Umframt greinir í mong bløð og rit hevur hann hildið fyrilestrar í Norðurlondum, Onglandi, Týsklandi og USA.

»Dreymar um opin vindeygu« er løgd til rættis og prentað á Hestpret. Hon er 220 síður til longdar og kostar kr. 250. Mentanargrunnur Studentafelagsins gav út.





















